## Obama skundar undir

Samráðingar í Washingon millum Barack Obama, forseta og umboð fyri ES endaðu í gjárkvøldið við, at amerikanski forsetin lovaði at seta meiri ferð á veðurlagstingingarnar fyri at fáa eitt gott úrslit á ST-ráðstevnuni í Keypmannahavn í desember. Men hóast tilsøgnina frá forsetanum vóru ES-umboðini vónsvikin. Formaðurin í ES-nevndini, Jose Manuel Barroso, segði við tíðindafólk, at tað er greitt, at eingin bindandi avtala verður gjørd í Keypmannahavn, tí tíðin er ov stutt. Hann vijaði Obama saman við svnska forsætisráðharranum, Fredrik Reinfeldt, sum er formaður í ES hetta hálvárið.



## Selja ikki Opel kortini

Amerikanska bilfyritøkan General Motors kunngjørdi eftir ein nevndarfund í gjárkvøldið, at hon fer ikki at selja týskua dóttirfelagið Opel. Týskarar hava leingi lagt trýst á General Motors fyri at fáa felagið at selja Opel, og í september segði leiðslan seg vera til reiðar aqt góðtaka, at kanadiska felagið Magna og russiski bankin Sberbank kundu keypa 55 prosent av Opel. Men í gjárkvøldið bleiv tann tilsøgnin tikin av borðinum. Sagt verður, at fyri tann komandi sølupolitikkin er tað er umráðandi fyri General Motors at varðveita Opel í Týsklandi og Vauxhall í Bretlandi.

# Væleydnaðar boringar vestan fyri Hetland

**Úrslitini av síðusporbrunnum á Glenlivet og Tornado leiðunum vestan fyri Hetland vísa, at fundini, sum vórðu gjørd í farna mánað eru meira áhugaverd enn higartil hildið. Møguleiki er fyri framleiðslu á báðum leiðum og samtíðis fáa tær eisini positiva ávirkan á gongdina á Føroyaøkinum.**

OLJULEITING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Síðani BP gjørdi tvey stór oljufund miðskeiðis millum Hetland og føroyska markið fyri skjótt 15 árum síðani er áhugin millum oljufeløg vaksin støðugt fyri at leita eftir olju og gassi á føroyska landgrunninum, hóast feløg í seinastuni hava tikið seg úr økinum. Eftir øllum at døma eru tað m.a. nýggj fund vestan fyri Hetland, sum varðveita vónina at finna olju og gass á landgrunninum her eisini. Tí vórðu tíðindini herfyri um eitt nýtt gassfund og eitt oljufund vestan fyri Hetland kærkomin fyri føroyskar oljumyndugleikar og oljufeløgini, sum eru virkin á landgrunninum. Tess meira olja og gass verður staðfest hinumegin markið tess størri verður áhugin og vónin at gera fund her eisini.

Nú boða danska DONG og eysturríkska OMV frá, at fundini tey gjørdu vestan fyri Hetland herfyri eftir øllum at døma eru enn meira lovandi enn higartil hildið. Síðusporbrunnar, sum eru boraðir á Glenlivetleiðini, sum er ein gassleið, ið DONG er fyristøðufelag fyri, og Tornadoleiðin, eitt oljufund, sum OMV umsitur, vísa nú, at fundini eru so mikið áhugaverd, at feløgini longu nú eru farin at umrøða hesi sum møgulig komandi framleiðandi felt vestan fyri Hetland.

DONG, sum er við í báðum fundunum, er eisini eitt av teimum mest virknu oljufeløgunum á føroyska landgrunninum. Søren Gath, stjóri sigur, at felagið síðani 2000 hevur verið við í flestu av fundunum, sum eru gjørd vestan fyri Hetland, og hetta ger støðuna hjá felagnum í øllum hesum økinum sera týðandi. Felagið er eisini við í teimum trimum fundunum, sum arbeitt verður við at menna og útbyggja. Tey eru Rosebank og Cambo nær føroyska markinum og Laggan, sum er eitt gassfund, sum liggur nakað eystari. Í kvøld skrivar Shetland Times, at Total er so smátt farið at tilrættaleggja bygging av einum stórum gassverki, sum skal taka ímóti gassi frá Hetlandsleiðunum. Hetta er góð tíðindi fyri øll tey, sum ynskja meira virksemi í økinum.

Dong hevur áður úttalað, at tað sær nógvar møguleikar og samanfall millum økið vestan fyri Hetland og tey loyvi, sum felagið luttekur í á føroyska landgrunninum. M.a. verður Dong við í boringini, sum Statoil fer undir í 2011 á føroyskum øki.

Faroe Petroleum, sum somuleiðis er við í teimum báðum seinastu fundunum vestan fyri Hetland, sigur í tíðindaskrivi, at úrslitið av síðusporboringini í Tornadofundinum skamt frá markinum ger økini føroysku megin markið uppaftur meira áhugaverd.

Tornado fundið hevur nevniliga týðandi ávirkan á loyvi 002 á føroyskum øki, og á loyvi P1552 (Marjun loyvi) á bretskum øki. Nýggjar verkætlanirnar verða nú gjørdar fyri hesi øki, við støði í úrslitinum frá Tornado fundinum.

Annars skilst, at komandi boring á føroyska landgrunninum, sum skuldi byrja í apríl ella mei næsta ár byrjar møguliga longu í februar ella mars.



*Transocean Rather, sum boraði Glenlivet*



*Stena Carron, sum boraði Tornado*

# Statoil vinnur nógvan pening

ÚRSLIT
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Tað mest virkna felagið á Føroyaøkinum, StatoilHydro – sum í hesi vikuni skifti navn til bert at eita Statoil aftur – hevði eitt nettoyvirskot fyrstu 9 mánaðarnar uppá góðar 28 milliardir norskar krónur. Hetta er tó 40% lægri enn árið fyri. Orsøkin er lægri olju- og gass prísir. Hóast tað so sigur felagið í tíðindaskrivi í morgun, at tað er sera væl nøgt við úrslitið.

Í tíðindaskrivinum verður m.a. sagt, at Statoil kann vísa á góð úrslit bæði í Noregi og internationalt. Framleiðslan er økt og er nú næstan 1,9 milliónir tunnur um dagin. Hóast hetta so er forstjórin framvegis varin um útlitini í heimsbúskapinum. Hann sigur, at sjálvt um vit síggja tekin um vøkstur í heimsbúskapinum, so eru vit langt frá normalum støði. Tí er framvegis neyðugt at vera varin. Tað verður framvegis fokuserað uppá at halda útreiðslunum niðri soleiðis, at felagið kann tillaga virksemið til sveiggini í heimsbúskapinum verður sagt.

Um framtíðina verður sagt, at dagliga framleiðslan fer at økjast frá teimum 1,9 milliónum tunnunum felagið í dag framleiðir, til 2,2 milliónir tunnur um dagin í 2012. Felagið sigur eisini, at tann mest týdningarmikli parturin til menningina eru leitibrunnar. Felagið væntar, at umleið 70 leiti- og metingarbrunnar vera boraðir í ár. Teir fyrstu 9 mánaðirnir í ár eru boraðir 53 leitibrunnar. Av hesum varð olja funnin í 32 brunnum.

Felagið væntar, at oljuprísirnir framvegis fara at sveiggja nógv, í øllum førum uppá stutt sikt.

Greinarar taka annars væl ímóti úrslitinum hjá Statoil í morgun. Sagt verður, at samanborið við onnur oljufeløg, sum t.d. ExxonMobil, Shell, BP og ConocoPhilips, so eru úrslitini hjá hesum feløgum lækkað, við 60% til 75% í mun til árið fyri.

*Nýggja búmerkið hjá Statoil, sum mánadagin skifti navn frá StatoilHydro til Statoil og samstundis fekk nýggjan samleika*